# Umhvørvið í hondunum á oljufeløgunum

*UMHVØRVI. Føroyska umsitingin er eftirbátur á umhvørvisøkinum. Oljufeløgini seta dagsskránna á umhvørvisøkinum og tað hevur skund, at fáa tann neyðuga førleikan, sum kann geva oljufeløgunum eitt mótspæl, sigur stjórin á royndarstovuni BIOFAR í Kaldbak*



*Fólk frá BIOFAR gera kanningar umborð á rannsóknarskipi*
*Mynd: BIOFAR*

**DÁNJAL HØJGAARD**

Ein møgulig oljuvinna nærkast við risafetum.

Umsóknarfreistin, at vera leita eftir olju í føroyskum øki er júst úti. Gongs sum ætlað kunnu tey fyrstu oljufeløgini seta borin í føroyska havbotnin kanska longu um eitt ár.

Men hóast vit standa á gáttina til eina oljuvinnu, so eru føroyingar enn ongan veg komnir at byggja eina umhvørvisumsiting. Eina umsiting, sum hevur fakligan førleika at tryggja, at tey neyðugu fyrilitini verða tikin til umhvørið, tá ið farið verður at bora.

Í løtuni eru tað oljufeløgini - og ikki føroyskir myndugleikar - sum seta dagsskránna á umhvørvisøkinum, sigur Jan Sørensen, leiðari á royndarstovuni BIOFAR í Kaldbak.

-Vit vera drigin aftaná oljufeløgunum, tá ið tað ræður um at verja umhvørvið. Og tað kann sjálvandi vera eitt vandamál, sigur hann.

### Blátt stempul

Áðrenn oljufeløgini sleppa at bora skulu tey hava eina umhvørvisgóðkenning frá føroyskum myndugleikum. Hvørt einasta felag ella samtak skal lata inn lata inn eina sonevnda EIA-frágreiðing (Environmental Impact Assessment). Hetta er ein frágreiðingin, sum lýsir umhvørvið í leitingarøkinum - og tað árin, oljuvirksemið kann hava á umhvørvið.

Árinskanningin skal við øðrum orðum vissa føroyskar myndugleikar um, at oljufeløgini vita hvat tey gera á umhvørvisøkinum.

### Mangla servitan

Jan Sørensen sigur, at higartil er tann neyðugi peningurin ikki settur av at byggja eina umhvørvisumsiting á oljuøkinum. Hetta átti longu at verið gjørt fyri rúmari tíð síðani, heldur hann.

Vanliga hava londini eisini orðað ein umhvørvispolitikk, áðrenn sjøtil verður settur á oljuvinnuna. Ein slíkan politikk hava Føroyar heldur ikki.

Mannagongdin í Føroyum er øðrvísi enn vanliga mannagongin í øðrum londum við oljuvinnu, sum Jan Sørensen veit um.

Í Føroyum eru tað oljufeløgini sjálvi, sum í fyrsta lagi stinga út í kortið hvat tey ætla og vilja. Men í síðsta enda skulu føroyingar góðkenna, at oljufeløgini ikki taka nøkur óráð fyri á umhvørvisøkinum.

Føroyskir myndugleikar mugu við øðrum orðum duga at lesa eina EIA-frágreiðing - og gjøgnumskoða um skil er í metingunum.

Hendan serkunnleika mangla føroyingar, nú oljuleitingin stendur fyri durum, sigur Jan Sørensen.

– Í Føroyum verður tað latið upp til oljufeløgini at gera sítt besta, tí okkum vantar tað neyðugu servitanina í løtuni. Tað er latið upp í hendurnar á oljufeløgunum at vísa hvat ið tey duga. Tað er politikkurin, sigur Jan Sørensen.

### Signalini mangla

Sambært stjóranum á BIOFAR er tað eitt vandamál, at Føroyar ongan umhvørvispolitikk hava orðað enn.

Eyðun Elltør, landsstýrismaður í oljumálum hevur fyri rúmari tíð lovað, at seta eina nevnd at orða ein umhvørvispolitikk. Men enn er eingin nevnd sett.

At eingin umhvørvispolitikkur er, merkir at oljufeløgini ongar høvuðslinjur hava at ganga eftir, tá ið tey fyrireika seg til oljuvinnuna. Tey hava við øðrum orðum ongar greiðar ábending um hvussu álvarsliga tær almennu Føroyar meta dálkingarvandan.

### Spjaddur serkunnleiki

Sambært Jan Sørensen er tað ein trupulleiki, at serkunnleikin á umhvørvisøkinum innan oljuvinnuna er so spjaddur.

Sum er sita serfrøðingarnir bæði á Fiskirannsóknarstovuni, Heilsufrøðiligu Starvsstovu og á BIOFAR. Hesir serfrøðingar eru upptiknir av øðrum uppgávum og stovnarnir hava avmarkaða orku at taka sær av oljuumhvørvi burturav.

Í Føroyum er bert eitt fólk, sum burturav tekur sær av umhvørvinum í sambandi við oljuvinnu. Hetta fólk er júst sett á Heilsufrøðiligu Starvsstovu og hevur um hendi lógina um havumhvørvi.

### Mugu játta pening

Jan Sørensen sigur, at peningur má játtast at menna tann neyðuga førleikan á umhvørvisøkinum.

Hinvegin setir hann spurnartekin við, um tað er skilagott at bygga eina nýggja deild, at umsita oljuumhvørvið. Ella um rættast er, at útbyggja servitanina, sum longu finst á stovnunum.

– Tað kann vera eitt tvíeggjað svørð, at stovna eina nýggja deild til hetta økið, sigur Jan Sørensen, sum óttast fyri, at stovnarnar verða tappaðir fyri serkunnleika.

### Vandi fyri inhabiliteti

Jan Sørensen viðgongur, at vandi kann vera fyri inhabiliteti, av tí at serfrøðin í Føroyum innan oljuumhvørvið er so avmarkað.

Raksturin av BIOFAR verður t.d. lutvís fíggjaðar við privatum konsulentvirksemi fyri oljufeløg. Tí fær BIOFAR ikki samstundis verið ráðgevi hjá teimum, sum í síðsta enda skulu umhvørvisgóðkenna somu oljufeløg, ávarar stjórin.

Ein slík støða kann lættliga gerast aktuell. Tí í løtuni situr BIOFAR inni við servitan, sum eingin annar hevur.

Δ



# Ráðgeving gevur pengar

BIOFAR hevur ein virknan leiklut í fyrireikingunum til eina møguliga oljuvinnu. Royndarstovan í Kaldbak hevur gjørt lívfrøðiligar kanningar av plantu- og dýralívinum við havsins botn, sum oljufeløgini hava fíggjað.

Stovnurin hevur nýliga latið úr hondum eina frágreiðing um tær innaru leiðirnar, sum oljufeløgini Amerada Hess, BP, Conco, Mobil, Philips Petroleum og Texaco hava fíggjað. BIOFAR ert eisini júst liðugt við eina frágreiðing um leitingarøkið í landsynning úr Føroyum. Tað er verkætlanin GEMS, sum hevur fíggjað hesa ætlan.

Umframt kanningar fyri oljuvinnuna ger BIOFAR eisini nógvar kanningar fyri alivinnuna. Hendan ráðgeving er í dag við til at fíggja virksemið á royndarstovuni, sum byrjaði sum ein altjóða verkætlan í 1988.



*Mynd: BIOFAR*

# Frøðingarnir meta um botnkanningar

Serkunnleikin skal nú taka støðu til, um neyðugt er við neyvari lívfrøðiligum kanningum av botninum, har oljuleitingin væntandi verður næsta ár



*Jan Sørensen, leiðari á royndarstovuni BIOFAR í Kaldbak við korallum, sum veksa á havbotninum, har ætlanin er at royndarbora eftir olju. Umhvørvisfelagsskapir siga, at korallirnar eru í vanda, men líkt er til tær eru harðbalnari, enn felagsskapirnir halda, tí tað er staðfest, at korallirnar veksa á sjálvum boripallunum* *Mynd: Jens Kr. Vang*

**DÁNJAL HØJGAARD**

Ein serfrøðinganevnd skal nú taka støðu til, um neyðugt er við fleiri forkanningum av havbotninum suður-eystanfyri Føroyar.

Hetta varð avgjørt á fundi í altjóða samstarvsbólkinum GEMS, sum er stytting fyri Geotechnical-Environment-Metocean and Safety.

Í serfrøðinganevndini situr Jan Sørensen, leiðari fyri BIOFAR í Kaldbak saman við tveimum útlendskum serfrøðingar. Teir skulu koma við einum tilmæli fyri 1. august í ár.

Tað eru oljufeløgini, sum ætla at leita eftir olju í føroyskum øki, sum standa aftanfyri GEMS. Hesi feløg eru áhugaði, at vita so nógv sum gjørligt um lívfrøðina í leitingarøkinum. Hetta so, at tey kunnu tryggja sær tað neyðugu umhvørvisgóðkenningina tá avtornar.

Tískil hava rannsóknirnar hjá BIOFAR eisini týdning fyri oljufeløgini. BIOFAR hevur júst latið tvær kanningar úr hondum, sum oljufeløg hava fíggjað. Onnur er at botnlívinum inni við land. Hin er gjørd fyri GEMS og er aktuell í sambandi við eina komandi oljuleiting. Kanningini er júst latin GEMS, men fyribils er hon ikki almenn.

### 60 kanningarstøð

BIOFAR hevur gjørt lívfrøðiligar botnkanningar á tilsamans eini 700 støðum kring Føroyar. Av hesum eru 60 í økinum, har mett verður, at størsta sannlíki er fyri, at oljuleitingin, sum byrjar næsta ár, verður.

Rannsóknirnar hjá BIOFAR eru kortini ikki tað einasta, serfrøðingarnir hava at styðja seg til.

Aðrar lívfrøðiligar botnkanningar eru eisini gjørdar í tí aktuella økinum. Hetta eru kanningar sum eru eldri enn tær hjá BIOFAR.

Eisini eru neyvar kanningar gjørdar av botninum við tær bretsku oljuleiðirnar skamt frá føroyska markinum. Hesar kanningar eru gjørdar við atliti til bretsku oljuvinnuna, men tær kunnu eisini geva eina ábending um lívið føroysku megin markið.

Jan Sørensen, leiðari á BIOFAR er varin, tá ið hann verður spurdur um kunnleikin til plantu- og dýralívið í føroyska leitingarøkinum er nóg góður.

Hann sigur, at tað mest sannlíka leitingarøkið gongur frá katinum á Hetlandsrennuni og niður í sjálva rennuna. Sotatt er talan fyri eitt stóran part um eina djúpa havleið, sum er 1.000 metrar djúp og kanska djúpri.

Sambært Jan Sørensen er djóralívið niðast í Hetlandsrennuni ríkt, men kortini einstáttað. Mynstrið er stórt sæð tað sama sum niðri í sjónum í Norskahavinum, sigur hann.

### Neyvari kanningar

Kemur serfrøðinganevndin undir GEMS til tað niðurstøðu, at fleiri kanningar mugu gerast við havsins botn verða kanningarnar gjørdar beinanvegin.

Umframt møguligar forkanningar skulu oljufeløgini eisini hvør í sínum lagi gera neyvari lívfrøðiligar kanningar í leitingarøkjunum, sum tey fáa tillutað. Hetta eru kostnaðarmiklar kanningar, sum krevja bæði fólk, útgerð og skip.

Jan Sørensen heldur tað vera hugsandi BIOFAR eisini verður við í teimum endaligu kanningunum.

Δ

RULLANDI REDAKTIÓNIN